# SO HEVUR TÚ SKRIVAÐ EINA ELLA FLEIRI




**Onkur hevur í skemti tikið til, at "tú arbeiðir ikki í Miðlahúsinum í Vágsbotni uttan so, at tú hevur givið eina bók út..." Tað er nú ikki heilt rætt, men hinvegin er tað ein sannroynd, at í minsta lagi átta fólk, sum arbeiða í húsinum ella hava tilknýti til húsið, hava givið út bøkur. Vit hava í hesi greinini hugt eitt sindur eftir, hvørjar bøkur hesi fólk hava latið úr hondum**

Vilmund Jacobsen

Nú blaðið í dag snýr seg um bøkur, hildu vit, at tað kundi verið eitt íkast til stuttleikar at tikið fram, at fleiri, sum arbeiða í Miðlahúsinum ella eru knýtt at húsinum, hava skrivað og útgivið bøkur.

Nógv ymisk tiltøk eru í Miðlahúsinum millum ár og dag, og fleiri høvundar hava eisini lagt fram sínar bøkur í hugnaligum umhvørvi í húsinum.

Seinasta bókaframløgan í Miðlahúsinum var seinasta fríggjadag, tá ein av okkara starvsfeløgum, Árni Joensen, legði fram sína nýggju bók, sum kallast "Góðan morgun, tað er politiið".

Undan eini slíkari framløgu ein fríggjadag ganga kanska fýra fólk niðri á kaffistovuni, sum øll hava tað til felags, at tey hava givið út bøkur. Tá kann onkur í skemti hava tikið til, at "tú arbeiðir ikki í Miðlahúsinum uttan so, at tú hevur givið eina út..."

Tað er so tað.

Men ein sannroynd er, at tilsamans átta fólk, sum í dag eru knýtt at húsinum, hava givið út eina ella fleiri bøkur.

At hesi eru so mong í tali, komst eisini til sjóndar mánadagin, tá vit skuldu taka eina felagsmynd av teimum øllum.

Umframt teir fimm, sum eru á felagsmyndini, vistu vit, at Óli Jacobsen og Óli Petersen ikki vóru tøkir til myndatøku tíðliga seinnapartin hendan dagin.

Eyðun Klakkstein, sum hevur givið út tvær bøkur um tónleik, er heldur ikki við á felagsmyndini.

## Árni Joensen

Taka vit fyrst Árna Joensen, sum júst er komin við nýggjari bók, kunnu vit siga um mannin, at hann hevur fingist við tíðindaarbeiði í ein hóp av árum. Í fleiri ár tilsamans hevur hann verið knýttur at Sosialinum, men hann hevur eisini gjørt ein hóp av útvarpssendingum.

Fyrsta bókin hjá Árna kom fyri seks árum síðan. Tað var bókin "Við úthavsins strendur" - fyrra bók. Hin seinna kom árið eftir. Hesar bøkur eru um vanlukkur í Norðuratlantshavi síðani 1950, og tær fingu góða móttøku.

"Góðan morgun, tað er politiið" snýr seg um mikumorgunin hin 16. november í 1994, tá politiið bankaði á dyrnar á skrivstovum og heima hjá privatfólki í Føroyum. Fólk fingu at vita, at tey vóru handtikin, skuldsett fyri at hava svikað ímóti landinum, og at politiið hevði fingið loyvi til at rannsaka skrivstovuna ella húsini fyri at fáa fatur á skjølum um skipabygging. Tá dagurin var av, hevði politiið skuldsett 46 fólk fyri svik ella roynd at svika og hevði lagt hald á fleiri tons av pappíri.

Bókin er um tað, sum hendi upp undir hendan dagin, sjálvan dagin og um tað, sum hendi aftaná.

Árni Joensen og húski hansara fluttu Danmarkar at búgva í 1997 og búsettu seg í Esbjerg. Har búgva tey framvegis, og tað er haðani, hann so trúliga skrivar tilfar til miðlarnar í Miðlahúsinum.

## Snorri Brend

Hann hevur drúgvar royndir sum blaðmaður á ymiskum bløðum í Føroyum, seinastu árini á Sosialinum. Árini 1981-1982 gekk hann á Gimlekollen Midiasenter í Kristiansand, og árini 1991-1993 arbeiddi hann sum samskiftisráðgevi hjá Heimamissiónini í Nesvík.

Snorri er annars útbúgvin pleygari í Viborg í 1991.

Bókin "Hon fór út" er søgan um Kaju Nemuel úr Rituvík, ið virkar sum trúboðari í afrikanska landinum Nigeria fyri danska missiónsfelagsskapin Sudanmissiónina.

Tað var Heimamissiónsforlagið, sum stóð aftanfyri bókina, ið kom út í oktober í 1999. Bókin kom út júst 30 ára dagin fyri, at Kaja Nemuel varð send út sum trúboðari.

Snorri var sjálvur og vitjaði í Nigeria á heysti 1997, har hann hevði samrøður við Kaju og fólk í hennara umhvørvi.

Kaja Nemuel er framvegis í tænastu sum trúboðari í landinum. Sama ár, sum bókin kom út, fóru Snorri og familja hansara sjálvi avstað sum trúboðarar til Mali, sum eisini liggur í Afrika.

"Hon fór út" gevur eisini eitt innlit í andaliga lívið í Rituvík í fimmti-og sekstiárunum og av teimum persónum, sum høvdu avgerandi týdning fyri andaliga lívið hjá Kaju Nemuel.

Í 1996 umsetti Snorri bókina "Hin vænasta rósan" eftir Dorthe Vestergaard Stieper, og her var tað eisini Heimamissiónsforlagið sum gav út.

Bókin er um eina unga trúgvandi gentu sum fær staðfest krabbamein, og sum at enda má geva upp stríðið ímóti hesi herviligu sjúku.

Í 1996 kom út "Missiónssangbókin", ið er sangbókin sum verður nýtt í samkomum hjá Heimamissiónini og Kirkjuliga Missiónsfelagnum. Ein serstøk sangbókanevnd fyrireikaði hesa bókina, og við í hesi nevnd var eisini Snorri Brend.







*Tað eru ikki bara teir fimm á høvuðsmyndini, sum arbeiða fyri Miðlahúsið og hava givið út bøkur. Tað hava Óli Jacobsen, Óli Petersen og Eyðun Klakkstein eisini*

Føroyaprent plantar trø